# gott arbeiðspláss



Nógv arbeiði er á Bakkaforst, og tí ræður um at hanga í. Eingin ivi er um effektivitetin hjá hesum virkisfúsu kvinnunum á Bakkafrost



Tær arbeiða í vaktum – ein vakt møtir kl. 8 og tann seinna vaktin kl. 4



– Bakkafrost er eitt gott arbeiði, sigur Mariann Nielsen sum hevur arbeitt her síðani 1991

Tað eydnaðist kortini at fáa yvirtalað hesar báðar kvinnurnar til eina stutta samrøðu.

## Gott arbeiðspláss

**Mariann Nielsen** byrjaði at arbeiða her á Bakkafrost í 1991. Tað vil so aftur siga, at hon hevur verið her í samfull 15 ár.

Hon gjørdi seg fyrst lidna við skúlagongdina, m.a. við Húsarhaldsskúla, og fór síðani higar at arbeiða.

Spurningurin til hana er sjálvandi, - hví heldur tú fram at arbeiða á einum slíkum virki?

– Hví man blívur við? Tja, tað má vera tí at mær hevur dámað hetta.

– Bakkafrost er í øllum førum eitt gott arbeiðspláss, sigur Mariann.

Arbeiðið hjá Mariann er í reinskeringini. Áður var hon eitt skifti í kryvjingini.

Hon byrjar hvønn dag um hálvgum átta-tíðina, og fer so heim kl. 4. Ofta verður klokkan tó eitt korter yvir.

– Tað er einki specielt sum so við einum slíkum arbeiði sum hesum. Men her er gott at vera og mær dámar væl hetta slagið av arbeiði, sigur hon.

Mariann er fáorðað og samrøðan er av. Hóast klokkuni vantar fáar minuttir í 12, so fer hon kortini oman aftur í skerihøllina.

Hon letur seg í arbeiðsklæðini og nær líka at koma í gongd aftur, tá klokkan boðar frá døgurða.

Einki við at spilla tíðina burtur uppá nakran máta!

**Sigrid Gaardbo** er ættað úr Nólsoy, men er búsitandi í Søldarfirði. Hon hevur arbeitt her í eini 12 ár.

Hennara arbeiði er at pilka tey eftirverandi beinini burtur úr flakinum.

Eftir at laksurin er skorin fer flakið gjøgnum eina pilkimaskinu, og so verður hvørt einstakt stykki eftirhugt.

– Her skal altso bara einki bein vera í, sigur Sigrid avgjørd á málinum.

Hon er samd við Mariann í, at sum so er tað ikki nakað serligt við hesum arbeiðinum.

– Tað er kanska ikki tað mest áhugaverda arbeiðið at pilka bein úr flaki. Men, man ger tað bara.

– Tá ein hevur vant seg við hetta slagið av arbeiði, so er tað bara OK.

## Tingini ganga

Sigrid arbeiddi áður í laksi í heimbygdini, men tá tað virkið fór av knóranum á sinni, fór hon út á Bakkafrost at arbeiða.

Eins og Mariann, er hon fegin um hetta arbeiðið og arbeiðsplássið.

– Her er gott samanhalda millum okkum. Vit hava eisini ein góðan formann, sum fær tingini at ganga soleiðis sum tey skulu, sigur Sigrid.

Samrøðan er liðug. Sigrid skundar sær aftur í arbeiðsklæðini og á sítt pláss á Bakkafrost.

Her er eingin tíð at spilla. Minuttirnir áðrenn døgurða eru eisini av stórum týdningi.

Hesir minuttir telja eisini í tí stóra samanhanginum!